



## Ársins leiðarar 2009

Frá tí almenna: Hjalti í Jákupsstovu, stjóri Fiskirannsóknarstovan
Frá tí privata: Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost

Í dómsnevndini sótu Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, Reidar Nónfjall, stjóri á Føroya Handilsskúla og Mary í Garði, stjóri á Nærverkinum.
Í grundgevingini fyri at kjósa Regin Jacobsen til ársins leiðara í privata vinnulívinum varð sagt, at Regin Jacobsen er framskygdur og hevur gjørt frambrot við vørumenning. Hann hevur gingið á odda í alivinnuni og víst áræði og dirvi, hann hevur skapt góð vinnulig úrslit og hevur varðveitt eitt stórt arbeiðspláss.
Í grundgevingini fyri at velja Hjalta í Jákupsstovu heiðurin at vera ársins leiðari hjá tí almenna í 2009 varð sagt, hann er framskygdur við áhaldandi at lýsa týdningin av gransking og menning, herundir røkt av okkara rávørutilfeingi. Men hann er eisini sjónligur í almenna rúminum og hóast mótgang og ofta stórar atfinningar, hevur hann varðveitt og ment sítt arbeiðspláss.



Tær báðar Synergi-damurnar, sum stóðu fyri Ársins Leiðaradegi: Ása og Annika Andreasen við blómutyssum til ársins leiðarar.

Í Sosialinum í morgin verður meira at lesa um ársins leiðaradag og um ársins leiðarar

# mingl ... mingl ...



Hendrik Egholm, stjóri í Føroya Shell og Jón Danielsen, stjóri í Articon



Smoothies-steðgur

*Tað er lætt at yvirliva í góðum tíðum. Men í verri tíðum er fortreytin ein sterk leiðsla, sum dugir at optimera á øllum økjum.*
Christian Nagata, ársins leiðari 2008



Ólavur Gregersen, stjóri í Bitland og Marner Jacobsen, stjóri í Eik



**Sosialurin var vertur fyri einum rimmar Afterparty í Miðlahúsinum og á Reinsarínum við góðum mati, undirhaldi, tónleiki og spennandi drykkjum. Fleiri myndir verða at finna sum myndarøð á Portalinum**